### Veðrur og sleppingarlamb

Tað er ikki longri síðan enn so, at tá Niclas Dahl í Hoyriksstovu var 12 ára gamal, tá tóku teir ein veðr, sum Billustovumenninir átti. Hann hevði staðið í tjóðri millum køstarnar og bara etið hømiliur. Hesin veðrurin bleiv so feitur, at alla ta síðstu tíðina reisti hann seg slett ikki. Tað hevur verið umleið 1890, at Niclas hevur verið við at leiða veðrin á fiskavektina. Hann vigaði 200 pund livandi, og tað vóru 40 merkur av tálg í honum.

Heini Gaard í Hálvmørk átti eitt sindur av jørð í Góðadali, og Jógvan Poulsen á Trøðni, sum giftist til Oyndarfjarðar átti eisini eitt sindur av jørð. Nú vil Jógvan hava eitt sleppingarlamb frá Heina Gaard í Góðadali, og hann letur eitt veðurlamb afturfyri. Hetta veðurlambið hevði 18 merkur í tálg, so tað má hava vigað nógv.

### Neyst og bátar

Eg skal fortelja frá bátunum og neystunum sum vóru, tá eg var smádrongur. Tað vóru fá neyst, og tey vóru heima í Støðni. Tað norðasta kallaðist Kulpuneystið. Onkur vil meina, at hetta er eitt írskt navn. Tað stóð tvørtur um við bakkanum niðan fyri Kvenngarðshús. Tað stóð líka sum suður og norð. Har var ein vegur millum Kvenngarðshús og tað neystið. Tað, eg minnist, vóru ongar hurðar fyri neystið, men bátur stóð inni. Hvør ið átti bátin veit eg ikki, eg rokni við, at tað hevur verið á Grunnlendi. Hini neystini vóru Garðineystið, tað var tað fyrsta, so Stórustovuneystið til tveir bátar, so Guttaneystið, so Sunnanneystið, og vóru hesi tvey neyst til ein bát hvørt. Hetta vóru neystini sum vóru í støðni. Nøkur eru komin norðari aftaná. So var tað í Oksastøð inni í Garði. Har vóru tvey neyst, og tað var Billustovuneystið, sum er dottið niður í 20-unum. Men fyrst eg minnist var tað í besta standi, og tað var takt við hálm. So høvdu Billustovumenninir eisini ein varðahjall innan fyri ánna og oman fyri brúnna. Hann var eisini taktur við hálm, og so Garðshornsneystið. Vit kallaðu tað Kirkjugarðsneystið av tí, at tað var innan fyri kirkjugarðin. Vit kallaðu altíð tann bátin fyri Grøni.

So var tað heima í støðni. Eg meini, at tað vóru tríggjar lunnbøtur, sum teir róptu. Ein lunnbót er til at draga bát í, tá hann ikki verður settur inn í neystið. Tað vóru tveir laðaðir veggir, sum tveir steinar høgir, og fastir lunnar lógu ímillum, akkurát tilpass fyri ein lítlan bát at standa inni í við lívskorðu báðu megin við. Tað brúktu teir fyri tað mesta um summarið. Teir smáu bátarnir stóðu sum oftast úti um. Eg meini, at tað vóru tvær undir Stovuneystinum, men tann seinasta sum var eftir stóð so undir Stovuneystinum.

Ja, eg minnist inni í Víkum, neystið sum var har. Tað var til tveir bátar. So var eitt hús omanyvir neystið, og tað høvdu teir til at goyma tjørutunnur, sirupstunnur og tílíkt í.

### Innan fyri ánna

Tá eg var smádrongur vóru átta hús innan fyri ánna. Tú kann ætla, at tann býlingurin er so mikið ungur. Eg minnist tey flestu av teimum niðursetufólkum, sum settu seg innan fyri ánna, burtursæð frá einum. Eitt hús var í Tarti. Har vóru fýra ættarlið, sum eg veit um.



*Á rættini. Jens Hvass prestur, Eivin Petersen og Jákup Martin Joensen*

Hini minnist eg øll. Undir Steininum minnist eg mammu Zakaris, hon kallaðist Magga, og maður hennara kallaðist Ólavur. Jóan Hendrik Weyhe í Kinn var slektaður úr Billustovu. Hann var niðursetumaður í Kinn. Kona hansara var úr Tarti, hon kallaðist Sigga.

So var tað Heini í Hálvmørk, Heini Gaard, hann var úr Garðshorni og konu hansara, Annu úr Tarti, tey minnist eg bæði. Og Jóan Pauli Thomsen og tann seinna konan. Jens Pauli Clementsen, hann bygdi Bakkahúsini, sum Abraham á Bakka keypti. Hann var slektaður av Syðradali. Hann bygdi aftur uppi á Fløtti.

### Peningurin sum mundi farið í luftina

Hetta var øll míni barnsdóms og ungdómsár. Eg kann fortelja eitt lítið trekk frá Høgna á Dunganum. Hann var slektaður úr Funningi. Tað vóru tveir brøður, Høgni Petersen og Peter Petersen, Petur í Hoygarðshúsi, sum vit róptu. Hann giftist inn har, meðan Høgni giftist inn á Dunga. Eg veit ikki, um hann mundi eiga nakra jørð, tá hann var ungur. Nú er tað, at hann skal fara til Fuglafjarðar at keypa jørð. Hann hevði pengarnar í einum pappírspetti. Hvar hann hevði tað, veit eg ikki, men teir gomlu plagdu at goyma slíkt í teirra føroysku húgvu. Hann gekk omanvið ánna innan fyri har í Garði, sum vit rópa. So gongur hann, og ikki fyrr enn hann kemur niðan undir Skarð, nú uppdagar hann, at hann hevur mist pengarnar burtur. Hetta var jú forferdiligt. Hann vendir so aftur og roynir at ganga har, sum hann hevur gingið. So fer hann niðan við ánna, og omanfyri brúnna, sum var tvørtur um ánna. Nú liggur pappírið á einum steini har. Hann lyfti hendurnar upp um høvdið og takkaði Gudi fyri. Tað var merkiliga heppið, at tað ikki var fokið í ánna.

### Røkt

At vera røktingarmaður gav ikki nógv. Eg veit ikki, um teir fingu tríggjar ærir í røkt, harragud sum tað var lítið. Og tað kom mangan fyri, at tað var minni enn tað.

Pápi var 17 ár fjallmaður á Grunnlendi, og so tóku vit brøðurnir við. Eg minnist einaferð, tað var eitt ringt ár, tá fingu vit bara eitt hálvt fjalllamb.

### Útróður í Oyndarfirði

So minnist eg sum smádrongur, at tað róðu tríggir motorbátar út í Oyndarfirði um várarnar. Klaksvíkin átti hesar bátarnar, tí Víkahandilin handlaði fyri Klaksvík. Teir fortoyaðu í Oyndarfirði, eg haldi at tað var frá mars mánaði, at teir høvdu loyvi frá tryggingini at leggja seg her á sandgrynnuni. So lógu teir fyri várið. Eg meini, at teir kallaðust soleiðis: Eivind, Angantyr og Halgafelli, sum var so lítil sum eitt 10-mannafar ella ein seksæringur. Tað var stuttligt at hoyra teir liggja og glinta har.

Tað bleiv nógvur útróður um veturin eftir, at eg fór til sjós, men tað vóru fáir bátar sum gingu út av Oyndarfirði um veturin. Tað vóru seksmannafør, sum róðu út, tó var eitt áttamannafar. Tað var Garðibáturin, men hann bleiv so lítið brúktur til útróður. Ábraham Ábrahamsen hevði hann tveir vetrar. Eg var við tann seinna veturin. Tann fyrra veturin róðu teir út í Djúpunum. Eg minnist, at tað var ikki til at fara útum oyggjar. Tað var sum ein býur at síggja av trolarum. Bátarnir róðu út



*Hús á Línheyggi, í Tarti og í Hálvmørk*



*Oyndarfjørður í 1911*